VÍF-Neistin 24-20 (8-11)

VÍF vann við mansverju

Hóast Neista-kvinnurnar meginpartin av dystinum vóru á odda, vunnu tær ikki upp land, tá VÍF brúkti taktiskar snildir móti endanum

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Miðskeiðis í seinna hálvleiki tók Sóley Mikkelsen sær um reiggj, og við nøkrum avgerandi málum fekk hon VÍF av álvara innaftur í dystin
Savnsmynd

VÍF-kvinnurnar, ið vunnu alt í fjør, fingu seg royndar framman fyri hálvttriðjahundrað áskoðarum í Vestmanna sunnudagin, tá Neistin var á vitjan. Tí Neistin stríddist væl, var á odda allan fyrra hálvleik, og helt fast um leiðsluna til langt út í seinna hálvleik.

Í hálvleikinum var Neistin á odda 11-8, og fyrstu fimm minuttirnar av seinna hálvleiki útbygdu tær leiðsluna til 14-9 í hesum spennandi og til tíðir væl spælda dystinum.

Eftir hálvleikssteðgin var Hallfríð Isaksen komin í málið fyri Manuelu Stan, og tá Hallfríð eftir einari løtu var skotin heit, stóð hon framúr væl og tók tað mesta – eisini, tá Neista-kvinnurnar komu fríar ímóti henni.

Tá so eitt sindur var liðið út á seinna hálvleik, tók Sóley Mikkelsen sær um reiggj, skoraði upp á tvey brotskøst og setti tveir aðrar bóltar í málið. Hesa løtuna skjeyt hon VÍF frá 14-17 upp á 18-19.

Síðani javnaði Hertha Simonsen fyri VÍF við einum týdningarmikilum máli til 19-19, og tá var tað, at kvinnurnar hjá Neistanum kendu seg so mikið hóttar, at tær bóðu um »time-out«.

VÍF meira burturúr

Henda minuttin brúkti VÍF kortini betri, tí teir síðstu átta minuttirnar av dystinum tóku vestmannakvinnur eitt vápn í brúk, sum Neistin ikki ordiliga dugdi at verja seg ímóti. VÍF fór út at mansverja Simonu Dziugyte og Katrin á Neystabø, og so fór broddurin av spælinum og leiðsluni hjá Neistakvinnunum.

Ta næstu løtuna skoraði VÍF fýra ferðir upp í slag, uttan at tað bragdaði hjá Neistanum, og so var støðan brádliga 23-19 til VÍF.

Óivað eitt sindur av einum vónbroti fyri Neistan, sum stóran part av dystinum hevði vist, hvussu tað kann bera til at fáa tær annars sterku VÍF-kvinnurnar trýstar niður á knæ, men samstundis man dysturin eisini geva teimum bláu eina vón um, at tað sær kanska ikki so galið út í vetur.

VÍF fekk kanska ta ávaringina, ið ofta skal til. Men taktiskt snildi og styrki móti endanum prógvaðu eisini, at VÍF veruliga er eitt lið, ið hini ikki skulu vænta sær nakaða frá, uttan at taktikkurin og orkan halda allar 60 minuttirnar.

Dysturin í tølum

VÍF-Neistin 24-20 (8-11)
Málskjúttur:
VÍF: Sóley Mikkelsen 10 (5), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Ioana Rapa 3, Hertha Simonsen 3, Jacklin Durhuus 2, Eyðbrit Andreasen 1, Alis Høghamar 1
Neistin: Mildrið Jacobsen 6, Simona Dziugyte 4 (2), Ata Høgnadóttir 3, Katrin á Neystabø 3 (2), Súna Mørk 2 (1), Rakul Augustinussen 1, Bjørg Patursson 1
Brotskøst: VÍF 5, Neistin 7
Útvísingar: VÍF 6, Neistin 1
Dómarar: Hannis Wardum og Ragnar Simonsen

Tjaldur-StÍF 24-27 (11-12)

StÍF vann botndystin

Útlendsku spælararnir hjá báðum liðum settu sín dám á, tá kvinnurnar hjá Tjaldri og StÍF hittust í botndysti í Runavík

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Ikki skerst burtur, at góðir útlendskir spælarar gera tað áhugaverdari bæði at spæla og síggja føroyskan hondbólt.

Í so máta var dysturin millum bestu kvinnuliðini hjá Tjaldri og StÍF í Runavík sunnudagin einki undantak, tí tað vóru útlendsku spælararnir, ið fyrst og fremst stóðu fyri undirhaldinum og spælinum í dystinum.

Tjaldur hevur eina á hvørjum bakki, og hjá StÍF er ein í málinum, ein á vinstra bakki og ein spælskipari.

Bara málini munnu siga sítt, tí av teimum 24 hjá Tjaldri skutu Milisa Ergic og Lanka Ribavic helvtina, og av teimum 27 málunum hjá StÍF áttu Asta Petraukieke og Alina Olaru 14.

Dysturin var annars nokk so javnur, og liðini fylgdust allan vegin – tó við StÍF sum tónagevandi fyri tað mesta. Men hóast StÍF í løtum hevði hug at fara frá Tjaldri, svaraðu tær á heimaliðnum aftur hvørja ferð og mistu líkasum ongantíð sambandið.

Men í síðsta enda gjørdist tað ov tungt, og tá verjuparturin hjá Tjaldri ikki fekk steðgað nóg nógvum, bleiv StÍF verandi omaná og vann við trimum málum.

Tað gav StÍF eitt sindur av luft, tí við sigrinum yvirhálaði liðið Stjørnuna, meðan Tjaldur enn er niðast við ongum stigi.

Dysturin í tølum

Tjaldur-StÍF 24-27 (11-12)
Málskjúttur:
Tjaldur: Milisa Ergic 7 (1), Lanka Ribavic 5, Beinta Joensen 4 (1), Haidi Heinesen 3, Turid Lamhauge 3, Kristina Ellingsgaard 1, Hansa Mikkelsen 1
StÍF: Asta Petraukieke 9 (1), Alina Olaru 5 (1), Ata Gregersen 4, Sunfríð B. Jacobsen 4, Anna B. Danielsen 2, Poula D. Olsen 2, Anna Petersen 1
Brotskøst: Tjaldur 6, StÍF 3
Útvísingar: Tjaldur 4, StÍF 2
Dómarar: Kristian Johansen og Sámal Hansen

VB-Stjørnan 26-22 (12-11)

VB heldur tørn

Munurin millum nýggja VB-liðið og tað »nýggja« Stjørnuliðið var skjótleikin

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Vóru tey spent í Vági, áðrenn kappingin fór í gongd, munnu tey ikki vera tað minni nú. VB-kvinnurnar hava spælt tveir dystir og vunnið báðar, og í spælinum hevur tað sæð bara heilt gott út.

Leygardagin var útsetti dysturin móti Stjørnuni á skránni, og hann vann VB við fýra málum – og uttan at kenna nakra beinleiðis hóttan frá gestunum úr Klaksvík.

Nýggja VB-liðið, ið stórt sæð er mannað við spælarum, ið lítið og einki kenna til bestu føroysku kvinnudeildina frammanundan, er spennandi. Men tað sama má so eisini sigast um »nýggja« liðið hjá Stjørnuni, ið er mannað við royndum og garvaðum spælarum, sum tó bara hava vant í tvær vikur.

Sjálvt um VB var betra liðið í Vági leygardagin, gjørdu tær úr Stjørnuni sær avgjørt ikki fyri skommum, og í veruleikanum var tað Stjørnan, ið kom fult so frægt frá byrjanini í dystinum sum VB.

Liðini fylgdust væl í fyrra hálvleiki, men tá VB-liðið hevði fótað sær í seinna, megnaði Stjørnan ongantíð at svara aftur og taka munin innaftur.

Serliga var tað skjótleikin, ið kom VB til góðar, og avgerandi munurin millum liðini bæði var, at VB dugdi og orkaði betur at seta ferðina upp, tá tað kravdist.

Kortini prógvaði málverjin hjá Stjørnuni, Agne Masenaite, at hon ikki skal undirmetast, og við nógvum og góðum bjargingum gjørdi hon sítt til, at Stjørnan ongantíð datt púrasta úr dystinum, men mestsum fekk fylgt VB til dyrnar.

Dysturin í tølum

VB-Stjørnan 26-22 (12-11)
Málskjúttur:
VB: Reda Kurkauskiene 8, Daiva Toumaite 8 (4), Anja Magnussen 5 (3), Arnleyð Hjelm 3, Laila Jespersen 2
Stjørnan: Danijela Ercevic 7 (3), Una Olsen 5, Súsanna Hansen 4, Natasja Stamenkovic 4, Jastrid Gullaksen 1, Davina Gullaksen 1
Brotskøst: VB 11, Stjørnan 3
Útvísingar: VB 2, Stjørnan 3
Dómarar: Birgir Dimon og Kári Niclasen

Stjørnan-Kyndil 19-22 (8-14)

Lotte spældi Kyndil á sigurskós

Tá Stjørnan var um at fáa fatur á Kyndli, var tað stórspælinum hjá Lotte Sørensen fyri at takka, at Kyndil fekk riðið stormin av sær og hildið støðuna

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Eina viku frammanundan hevði Stjørnan tikið Neistan á bóli við einum óvænta-dum javnleiki í KÍ-høllini, men tá hitt høvuðsstaðarliðið, Kyndil, vitjaði í Klaksvík sunnudagin, eydnaðist ikki teimum í Stjørnuni at endurtaka »kunststykkið«.

Ein orsøk var kanska, at Stjørnan dagin fyri hevði verið suðuri í Vági og spælt, og at orkan tí ikki var tann, hon kanska kundi verið.

Men ein onnur orsøk var so sanniliga eisini Kyndla-spælarin Lotte Sørensen.

Hon vísti seg frá síni bestu síðu við framúr góðum spæli so at siga allan dystin. Tað lá væl fyri hjá henni at spæla hinar leysar til skot, umframt at væl lá fyri hjá henni sjálvari at royna seg móti málinum - ikki minst í avgerandi løtuni.

Og avgerandi løtan var mitt í seinna hálvleiki, tá Kyndil fekk troðkað seg fram um Stjørnuna og síðani koyrt sigurin heim.

Eftir at Kyndil eftir eina framúr góða byrjan í dystinum við leiðslustøðum sum 7-1 og 10-3 hevði verið væl og virðiliga á odda, brúktu tær í Stjørnuni síðstu kreftirnar uppá at svara aftur. Serliga í skjótálopum hevdu tær eydnuna við sær.

Tað var eisini um at eydnast, tí ta einu løtuna var bara eittans málið á muni. Men júst hesa løtuna legði Lotte Sørensen nógv fyri og skoraði eisini tvey mál, ið hildu Stjørnuni burturi frá sínari aðru sensatión upp í slag í Klaksvík.

Tí var tað so skjótt, at Kyndil kom fyri seg aftur og var fimm mál frammafyri. Tað var ein leiðsla, Stjørnan líkasum einki fekk gjørt við, og at enda vann Kyndil eisini dystin við trimum málum.

Men tað kravdi sítt stríð at fáa henda sigurin, og kanska fara onnur lið eisini at sleppa at royna seg, tá tey møta Stjørnuni á heimavølli í vetur…

Dysturin í tølum

Stjørnan-Kyndil 19-22 (8-14)
Málskjúttur:
Stjørnan: Danijela Ercovich 6 (3), Natasja Stamenkovich 4, Jatrid Gullaksen 2, Joan Midjord Joensen 2, Una Olsen 2, Súsanna Hansen 1
Kyndil: Lotte Sørensen 7 (4), Annika Thomsen 6, Ileana Manulescu 3, Heidi Maria Akselsen 2, Ann Mari Wang 2, Ann Hansen 1, Marjun Tróndarson 1
Brotskøst: Stjørnan 3, Kyndil 4
Útvísingar: Stjørnan 3
Dómarar: Vagnur Johannesen og Jákup Dam

VÍF-Neistin 28-25 (12-12)

Undirhaldandi í Vestmanna

Eftir undirhaldandi og spennandi kvinnudystin skuldu menninir hjá VÍF og Neistanum vísa, hvør dugur var í teimum. Og tað megnaðu teir eisini

MANSHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Ingi Olsen og beiggin Áki høvdu sín avgerandi leiklut í sigrinum hjá VÍF á Neistanum sunnudagin
Savnsmynd

Nógv mál, lív í høllini, gott spæl, ferð, spenningur.

Jú, tað var alt samalt har, tá VÍF og Neistin brustu saman í høllini í Vestmanna. Menninir høvdu eisini eitt sindur av livað upp til, tí kvinnudysturin frammanundan hevði av álvara hitað áskoðararnar upp, so teir vildu síggja meira!

Og einki stóðu mannfólkini aftan fyri konufólkini, tí talan bleiv um ein finan dyst, har Neistin fekk fylgt VÍF næstan allan vegin.

Bæði lið brúktu breiddina og skjótleikan, og tí komu eisini nógv mál í dystinum, ið fyri tað kundi verið ein toppuppgerð nógv seinni á vetrinum.

Neistin hevur nakrar ungar og skjótar spælarar, ið boða frá góðum í framtíðini, og teir yngru vóru ikki teir, ið stóðu aftast, tá tað ráddi um at bjóða samansjóðaða og roynda liðnum hjá VÍF av. Ikki minst hetta var við til at geva dystinum tað, ið skal til fyri at tryggja undirhaldsvirði.

Olsen-beiggjarnir

Kortini skal so eisini sigast, at VÍF í beiggjunum Inga og Áka Olsen hevur nakað, flestu av hinum liðunum kanska mangla í avgerandi løtunum og tá tað ræður um at halda høvdið kalt.

Ingi hevði sum vanligt ein stýrandi leiklut á liðnum, men eiisni nækur góð skot, ið góvu bæði verju og málmanni hjá Neistanum trupulleikar ferð eftir ferð. Serliga í seinna hálvleiki gjørdi hann teimum bláu lívið súrt, tí hvørja ferð Neistin vildi sleppa avstað, var Ingi har við einum máli, ið helt vestmenningum til.

Og júst sum Neistin skuldi taka dik á seg tíggju minuttir fyri tíð, tók Áki við og skjeyt nøkur avgerandi mál. Eini tvey ella trý av teimum vóru hesi drepandi undirhondsskotini, ið málverjarnir hjá Neistanum ikki vistu av, fyrr enn bóltur spraklaði í meskunum.

Tá VÍF var komið upp á 24-20 og bara fimm minuttir vóru eftir, munaði so lítið hjá Neistanum at gera eina síðstu roynd, tí alla tíðina hevði VÍF yvirskot til at skora afturímóti, og soleiðis endaði hesin góði dysturin við sigri til favorittarnar.

Vestmenningar høvdu kanska ikki spælt seg heitar, tá teir vitjaðu í Hoyvík mikukvøldið, men sunnudagin vístu og prógvaðu teir, at tú altíð kanst rokna við teimum, tá talan er um fremstu rød.

Neistin kom í sínum lagi avgjørt burtur úr dystinum við varðveittari æru. Og lítið vantar í, at liðið er so mikið vælkoyrandi, at tað kann geva sjálvt VÍF størri trupulleikar enn hesa ferð. So eru hini eisini ávarað…

Dysturin í tølum

VÍF-Neistin 28-25 (12-12)
Málskjúttur:
VÍF: Ingi Olsen 10 (3), Ólavur Brimnes 4, Áki Olsen 4, John Zachariasen 4, Sámal Joensen 2, Piti Negru 2, Rógvi Nielsen 1, Daniel Rapa 1
Neistin: Morgan Knezevic 9 (3), Jón Ludvig 5, Dann Thorleifsson 4, Helgi K. Justinussen 3 (1), Helgi Michelsen 2, Birgir Kass 1, Ragnar Staksund 1
Brotskøst: VÍF 4, Neistin 7
Útvísingar: VÍF 3, Neistin 1
Dómarar: Hannis Wardum og Ragnar Simonsen

Tjaldur-StÍF 25-31 (11-17)

Sigurin hjá strandingum var ongantíð í vanda

Hóast mansverja hjá báðum pørtum í løtum ávirkaði spælbýtið í seinna hálvleiki, vunnu strandingar ein tryggan sigur á runavíkingum

MANSHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Strandingar vunnu í tølum mest sannførandi sigurin um vikuskiftið, tá teir í Runavík vunnu við seks málum á Tjaldri, ið framvegis eigur troystasleysa aftasta plássið í bestu mansdeildini við enn ongum stigi.

Og hevði tað ikki borið so illa á hjá StÍF, at Artur Johansen í fyrra hálvleiki beklaði og mátti fara úr dystinum, kundi kanska verið enn verri statt hjá Tjaldri, sum ongantíð veruliga fekk fatur á StÍF.

Tað var nokk so skjótt, at strandingar vóru farnir eini fýra mál framum, og í hálvleikinum vóru teir á odda 17-11. Tjaldur svaraði eitt sindur aftur fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, men eftir einari litlari løtu mitt í hálvleikinum hevði StÍF aftur stungið seg sjey mál framum.

Størsta hóttanin, Tjaldur hevði, var uttan iva Dragija Stojovic, ið smekkaði til og skoraði, hvørja ferð hann slapp so mikið leysur av verjuni hjá StÍF. Men í seinna hálvleiki bleiv hann mansvardur, og so var tann hóttanin ikki so stór.

Tjaldur brúkti eisini mansverju í sínum royndum at vinna seg innaftur í dystin, og í seinna hálvleiki bleiv spælandi venjarin hjá StÍF, Costin Dumitrescu tikin burturúr.

Hóast spælgongdin soleiðis kundi ávirkast báðar vegir í løtum í seinna hálvleiki, var sigurin hjá strandingum ongantíð í vanda, og síðsta korterið høvdu teir longu vunnið sær tað, teir skuldu hava, og so var bara at halda fast.

Dysturin í tølum

Tjaldur-StÍF25-31 (11-17)
Málskjúttur:
Tjaldur: Dragija Stojovic 13 (2), Arnfinn Langgaard 5, Sverri Justinussen 4, Tórhallur Thomsen 2, Zoran Sarpevic 1
StÍF: Costin Dumitrescu 11 (5), Sveinur Justinussen 10 (1), André F. Danielsen 3, Bent Djurhuus 2, Leivur Justinussen 2 (1), Artur Johansen 1, Kristjan Petersen 1, Jón Rasmussen 1
Brotskøst: Tjaldur 2, StÍF 5
Útvísingar: Tjaldur 2, StÍF 3
Dómarar: Kristian Johansen og Sámal Hansen

Hondbóltsstøðurnar

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	2	2	-	0	0	54	38	16	4
2 Kyndil	3	2	-	0	-	81	69	12	4
3 VB	2	2	-	0	0	50	40	10	4
4 Neistin	3	1	-	1	-	60	60	0	3
5 StÍF	2	1	-	0	-	52	62	-10	2
6 Stjørnan	3	0	-	1	2	56	63	-7	1
7 Tjaldur	3	0	-	0	3	60	81	-21	0

1. Deild menn

	dystir	v	-	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	2	2	-	0	0	58	47	11	4
2 StÍF	3	2	-	0	-	89	79	10	4
3 Neistin	3	2	-	0	-	78	72	6	4
4 H71	3	2	-	0	-	71	70	1	4
5 Kyndil	2	1	-	0	1	52	53	-1	2
6 Tjaldur	2	0	-	0	2	51	62	-11	0
7 KÍF	3	0	-	0	3	60	76	-16	0